
Músabilurin

Uppi á ovasta lofti heima hjá okkum búðu einaferð fýra mýs: ein músapápi, sum æt Mús, ein músamamma, sum æt Mýsla, og tvey músabørn, drongurin æt Stubbi, og gentan æt Snøgga. Hesar mýsnar tordu ongantíð oman av ovasta lofti, tí vit áttu ein gráan fress, sum tær ræddust. Fressurin var eisini óføra góður rottukattur og kvikur sum snarljósið. Hann fangaði allar tær rottur og allar tær mýs, sum hann sá — og tær vóru ikki so fáar.

— Men nú eru bara triggjar mýs á ovasta lofti.



Tí — einaferð hevði abbi hongt eitt skerpitjógv upp á hanabítan á ovasta lofti. Og tá ið hann á ólavsøku fór upp eftir tí at taka tað oman til nátturða, var hann illa við. Tjógvið var heilt at síggja, men tómt innan. Tá høvdu mýsnar klíntrað upp eftir sperrunum og yvir á tógvið, bitið hol á músabítan og farnar inn í tógvið og etið tað tómt innan, meðan skinnið hekk heilt uttaná.


Abbi var spinnandi illur og setti eina músafellu upp á ovasta loft. Fellan stóð eina viku, og eingin mús kom í hana. Fellan stóð tvær vikur, og eingin mús kom í hana. — Kanska vóru tær rymdar, ella vóru so mettar av tjónum, at teim ikki tørvaði meir?

Men so ein dagin í triðju viku fór abbi upp at vita. Tá sat ein livandi mús í felluni á ovasta lofti — og tað var Mús sjálvur. Abbi tók felluna oman í túnið, kiskaði eftir fressinum og slepti músini út til

hansara. Tað var skjótt, í sama viðbragdi brá fressurin sær á, hevði annan framlabban í mýsina, so hon doyði — og hann át hana.

Nú áttu mýsnar á ovasta lofti ongan pápa. Hann hevði altíð verið so raskur og djarvur, og mangan ferð hevur hann sníkt seg oman í køkin at fáa sær ein bita til børn síni og konu — tá ið hann visti, at fressurin var úti. — Og nú mátti Mýsla sjálv veiða mat niður í smáu músabørnini. — Mangan var svangligt, tí hon tordi ikki so væl sum pápin.

Ein dagin vóru allar triggjar mýsnar, mamman og bæði børnini, komnar oman av ovasta lofti og út í tún. Fressurin lá í túninum og svav, og nøkur børn spældu sær niðri á vegnum við einum kassabili.



Tá segði Stubbi við mammu sína, at hann vildi hava ein sovorðnan bil, sum børnini høvdu at spæla við, og tað vildi Snøgga eisini. Mamman helt tað vera so vandamikið, tí tey vóru so smá músabørn enn, og fressurin kundi altíð vakna og síggja tey og eta tey.

Men músabørnini fóru bæði at nísta, tí tey vildu hava ein bil. — Og fressurin vaknaði av nístinum og sá tey. Hann stakk upp og sprakk eftir teimum. Í somu løtu, hann leyp og rætti báðar framlabbarnar eftir teimum, eydnaðist teimum akkurát at sleppa inn í eitt hol í grundini.

Tá vóru tey kløkk.

Og Stubbi hevði gressuliga ilt uttast í halanum, tí fressurin rakk akkurát at klóra hann, tá ið hann smoygdi sær inn í grundina.

— Har síggja tit, hvussu kvikur fressurin er, segði Mýsla, — og hann er hin argasti fíggindi okkara. Og nú mugu tit akta meg betur eina aðra ferð, tí eg kenni allar fressar og veit, hvussu skaðiligir teir eru fyri smáar mýs.

— Men ikki veit eg. — Músabørnini vildu hava ein bil at spæla við.

Og ein dagin gav mamman eftir og segði við tey, at tey kundu gera sær ein bil sjálv. — Men ansið tykkum fyri fressinum!

So fóru bæði músabørnini, Stubbi og Snøgga, at leita sær eftir tilfari til bilin eina náttina. Í einari spann funnu tey sær eitt lítið, tómt sildablikk til bil, og so funnu tey sær fýra stórar gularótadálar til hjól og tvey slikkupinnatrø til ásar millum hjólini. Eitt lítið karamellupappír løgdu tey niður í botnin á bilinum at sita á. Og so funnu tey sær ein svávulpinn til róðurstong og eitt tveyoyra til róður. — Hetta settu tey so saman og fóru at royna bilin úti í túninum, tí nú høvdu tey ikki sæð fressin í fleiri dagar. Hann var helst rýmdur ella skotin kanska.



Hetta var so stuttligt, tí bilurin trillaði so væl undan brekku, oman eftir túninum — og tey hugdu hvørki til høgru ella vinstru, tey bara trillaðu beint omaneftir. Stubbi stýrdi, og Snøgga helt fast í hann — og tað var so stuttligt. Men nú ólukkutíð, tá ið tey komu við fúkandi ferð oman um húsini, rendu tey beint á fressin, sum lá har og svav. — Og tað var ein brestur — bilurin brotnaði í 25 petti, og fressurin varð so skakkur, at hann sprakk í leysum lofti høgt upp um garðin og rann tað dýrasta, hann var mentur, langt niðan í hagan, so bangin var hann. Hann hevði eisini so ilt í halanum, tí halin var komin inn undir bilhjólini og kleimdur.

Tá skundaðu músabørnini sær upp á ovasta loft til mammu sína og søgdu henni alla søguna — og tey flentu at fressinum, sum tey høvdu stygt burtur.

Og fressurin tordi ikki heim aftur fyrr enn á jólum — gorhungraður.

Oskar Hermansson